# Runavíkar Kommuna søkir *havnaumsjónarfólk*



Runavíkar havn er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss. 3 fólk eru í føstum starvi. Árliga vitja umleið 1600 skip havnirnar í Runavíkar kommunu.

Av tí, at 1 av havnaumsjónarmonnum okkara fer frá fyri aldur, søkir Runavíkar kommuna eftir havnaumsjónarfólki at byrja skjótast til ber.

**Førleikakrøv o.a.**
Arbeiðið er burturav skipað í skiftandi vaktum undir leiðslu av havnarstjóranum og í tøttum samstarvi við onnur starvsfólk hjá kommununi.

**Av umsøkjarum vænta vit hesar førleikar**
- Viðkomandi nautiska útbúgving.
- Góðar málsligur førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum, norðurlendskum og enskum.
- Teldukunnleiki.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið í lønarflokki 4,1. - 7. stig.

Harafturat verður veitt ein føst mánaðarlig viðbót fyri vaktir.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita at venda sær til havnastjóran, Jón Nónklett, tel 288880.

**Umsóknir**
Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Runavíkar kommunu,
Heiðavegur 26,
FO 600 Saltangará.

- og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. apríl 2008, kl. 12.00.

Runavíkar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir, ella onga at taka.



Runavíkar kommuna

Heiðavegur 26 · 600 Saltangará · Tel 417000 · Faks 417001
runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

KREA

# Montørur til FT Samskifti

*"Skifta vit ikki kós, enda vit helst har, vit stýra"*

Kinesiskt orðatak



**Søkt verður eftir montøri til Tænastudepilin á FT Samskifti í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum.**

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði, sum umfatar:**
- Nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum
- Vanliga telefonútgerð
- Vekslarar
- Innanhýsis kaðalskipanir
- Terminalar av ymiskum slag
- Internet, ISDN og ADSL
- At ráðgeva viðskiftafólk um kundaútgerð og tænastur.

**Útbúgving:**
Elektronikkmekanikari, elektrikari, líknandi útbúgving og/ella hollar royndir sum montør-/kaðalmaður.

Tann, ið sett/-ur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða opin og duga væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hava royndir innan KT á brúkarastøði.

Uppmøtingarstaður er Klingran í Hoyvík og arbeitt verður í øllum Miðøkinum, tvs. Tórshavn, Norðstreymoy, Vágum og Sandoy.

Starvið er lønt sambært sattmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Áhugað kunnu venda sær til Bjørn M. Mortensen, bólkaleiðara, ella Elisabeth Carlsson, depilsleiðara á tel 30 30 30.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. apríl 2008 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

FT Samskifti er dótturfelag Føroya Tele. Felagið rekur alla kundarøkt, alla sølu og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og alla støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. FT Samskifti gevur nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*